Dagf. 3. mai 2022
UMMR J. nr.: 21/09341-3

Kaj Leo Holm Johannesen,
Landsstýrismaður

Svar
upp á

Fyrispurning nr. 52-171/2021 eftir § 52a í tingskipanini um sjálvstøðugur limaskapur í Norðurlandaráðnum, frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er gongd í málinum um at tryggja Føroyum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum?
2. Lúka Føroyar formligu treytirnar fyri limaskapi í Norðurlandaráðnum?
3. Um ikki, hvør er forðingin fyri at Føroyar kunnu gerast sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum?
4. Nær kunnu vit vænta, at Føroyar verða sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum?

Til spurning 1
Ja, tað er tað. Landsstýrið og løgtingsins limir í Norðurlandaráðnum arbeiða miðvíst saman um hetta mál.

Til spurning 2 og 3
Helsingfors sáttmálin hevur fimm sáttmálapartar. Hesir eru Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki. Allir eru teir fullveldisríki.

Uttan at tað verður nevnt ítøkiligt, er eingin ivi um, at Helsingfors sáttmálin setur sum treyt, at limaskapur er bert møguligur fyri norðurlendsk fullveldisríki.

Orsakað av ríkisrættarligu støðu Føroya, verður mett torført hjá Føroyum at gerast sjálvstøðugur sáttmálapartur at Helsingfors sáttmálanum. Sjálvstøðugur føroyskur limaskapur hevði í fyrstu atløgu kravt eina broyting av Helsingfors sáttmálanum. Í øðrum lagi hevði eisini verið neyðugt hjá ríkismyndugleikunum at broytt støðu í mun til spurningin, hvørt Danmark og Føroyar kunnu verða sjálvstøðugir sáttmálapartar at Helsingfors sáttmálanum.

Hóast hesi formligu viðurskifti, so verður arbeitt frá føroyskari síðu fyri at fáa undirtøku fyri, at Føroyar kunnu gerast sjálvstøðugir limir í Norðurlandaráðnum og í Norðurlanda Ráðharraráðnum. Norðurlendska samstarvið hevur verið neiliga ávirkað av Korona farsóttini, og arbeitt verður í løtuni við at styrkja norðurlendska samstarvið innan tilbúgving og veitingartrygd. Í hesum sambandi hevur verið nevnt, at tað møguliga kann gerast neyðugt at broyta Helsingfors sáttmálan.

Til spurning 4
Hetta er trupult at meta um, men tað verður arbeitt miðvíst fyri at vinna okkum fullgildigum limaskap í Norðurlandaráðnum og Norðurlanda Ráðharraráðnum. Fortreytirnar fyri at røkka hesum máli eru, at undirtøka er frá øllum norðurlondum til at broyta Helsingfors sáttmálan.

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður